Kommunufelagið

Dagfesting
19. februar 2019

Okkara j.nr.
19/00652-2

Málsviðgeri
EyC

Tygara j.nr.
19/00055-1

Fiskimálaráðið
Heykavegur 6
100 Tórshavn

**Viðv. uppskoti til løgtingslóg um veiðigjøld**

Fiskimálaráðið hevur 12. februar 2019 sent Kommunufelagnum uppskot til løgtingslóg um veiðigjald og kunngerð um veiðigjald 2019 til hoyringar við freist til týsdagin 19. februar 2019 kl. 13. Hoyringsfreistin er – sum vanligt – sera stutt, í hesum føri minni enn ein vika.

Løgmansskrivstovan hevur annars júst givið út rundskriv um lógarsmíð, har tað verður staðfest, at "ummælisfreistin eigur ikki at vera styttri enn 4 vikur." (...) Tað er ógvuliga týdningarmikið, at øll uppskot verða send til ummælis. Hetta so at borgarar, vinnulív, almennir myndugleikar, stovnar o.o. fáa høvi at gera viðmerkingar og siga sína hugsan um uppskotið." [1]

Vit kunna bara enn einaferð staðfesta, at landsstýrið ikki livir upp til egnar ásetingar.

Orsaka av stuttu hoyringsfreistini hevur stýri felagsins ikki havt møguleika at viðgera fyriliggjandi uppskot. Av somu orsøk tilskila vit okkum eisini rættin til at koma við fleiri viðmerkingum seinni.

**Viðmerkingar til uppskotið**

Verður samlaða veiðigjaldið 220 mió. kr., so missa kommunurnar sambært viðmerkingunum til uppskotið uml. 6 mió. kr. í beinleiðis partafelagsskatti. Hetta er skeivt. Um veiðigjaldið er 220 mió. kr., so missa kommunurnar **12 mió. kr. árliga** í beinleiðis partafelagsskatti.

Hvønn avleiddan fíggjarligan virknað uppskotið annars hevur fyri kommunurnar, verður als ikki viðgjørt, og enn minni greinað í viðmerkingunum til uppskotið.

Kommunufelagið hevur áður gjørt vart við, at í tann mun at nýggjar inntøkur verða fingnar til vega, sum t.d. í hesum føri við tilfeingisgjaldi, so eiga kommunurnar at fáa ein sjálvsagdan lut í hesum inntøkum. Hetta tí, at tað í stóran mun eru kommunurnar, sum gera íløgur av ymsum slagi, sum eru við til at skapa fyritreytirnar fyri, at hetta tilfeingið kann koma til høldar.

**Partur av veiðigjaldinum skuldi fella til kommunurnar**

Kommunali geirin hevur seinastu árini mist 10 tals-milliónir orsakað av ymiskum lógarbroytingum hjá sitandi samgongu. Millum annað misti kommunali geirin 25 mió. kr. í árligum inntøkum í sambandi við, at skattingin av fyritíðarpensjónum bleiv broytt.

---

[1] S. 27 Rundskriv um lógarsmíð, Løgmansskrivstovan, januar 2019.

Kommunufelagið

Bæði løgmaður og landsstýriskvinnan í fíggjarmálum hava alment sagt, at *"málið hjá landsstýrinum er framvegis, at kommunurnar samanlagt ikki skulu vera fyri fíggjarligum missi vegna lógaruppskot hjá sitandi samgongu."* [2]

Í hesum sambandi hevur landsstýrið í fleiri umførum nevnt, at inntøkurnar frá veiðigjaldinum partvíst skulu fella til kommunurnar, seinast í skrivi til felagið dagfest 9. januar 2019.

Í skrivinum stendur m.a.: *"Tá umræður málið viðvíkjandi skattalættanum til fyritíðar-pensjónistar í 2017, sum Kommunufelagið nýtir sum grundgeving, so hava landsstýris-kvinnurnar í fíggjarmálum og almannamálum longu í november 2017 boðað Kommunu-felagnum skrivliga frá, at ætlanin er, at kommunurnar fáa part av komandi veiðugjaldinum, ið gevur kommunum áleið ta meirinntøku, ið skattalættin til fyritíðarpensjónistar gav í minniinntøku.*

*Kommunufelagið er vitandi um, at Løgtingsins Vinnunevnd hevur løgtingsmálið um veiðigjøld til viðgerðar. Málið hevur verið til viðgerð á Løgtingi, er nú í nevndini til víðari viðgerð, og skal eftir ætlan samtykkjast í vár. Hetta er ein tilgongd, ið Kommunufelagið, eins og Fíggjarmálaráðið, eiga at virða."* [3]

Hetta skrivar Fíggjarmálaráðið fyri góðum mánað síðani í brævi til Kommunufelagið. Men henda ætlanin hjá landsstýrinum er nú eftir øllum at døma ikki aktuell.

**Samanumtikið**
Kommunufelagið kann bara staðfesta, at fyriliggjandi uppskot, eins og fleiri onnur uppskot hjá hesari samgonguni, tekur burturav inntøkugrundarlagnum hjá kommunala geiranum.

Hinvegin hava bæði løgmaður og landsstýriskvinnan í fíggjarmálum nú í fleiri umførum boðað Kommunufelagnum frá, og eisini boðað frá alment, at samanlagt skulu lógarbroytingarnar hjá samgonguni ikki kosta kommununum nakað, heldur hinvegin.

So spurningurin frá Kommunufelagnum er enn sum áður:

- Hvussu ætlar landsstýrið at kompensera kommununum fyri tann inntøkumiss, sum landsstýrið hevur verið atvoldin til ?

Vegna
Kommunufelagið

Dennis Holm, Formaður

Eyðun Christiansen, Stjóri

---

[2] Skrivligur fyrispurningur til løgmann 16/2018, -15-03-2018. At geva kommununum fult endurgjald fyri tap í sambandi við hækkaðu fyritíðarpensjónirnar. Spyrjari Brandur Sandoy. Annars endurtikið fleiri ferðir, seinast í tíðindaskrivi frá landsstýriskvinnuni 10. januar 2019.
[3] Skriv frá Fíggjarmálaráðnum til Kommunufelagið, dagfest 9. januar 2019.

**R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn**

**Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo**